**Leiðbeining til lærarar**

# Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur

**Kravt undirvísingarevni á 1.-9. floksstigi**

**1. august 2024**

Krøvini til kravda undirvísingarevnið kvæðamentan, kvøðing og føroyskan dans eru ásett í námsætlanini í kvæðamentan, kvøðing og føroyskum dansi 1-9 og í støðisnámsætlanini. Í hesi leiðbeiningini eru frágreiðingar um nøkur av hesum settu krøvum. Sitat úr galdandi námsætlanum eru markað við skákskrift.

## Tilhoyrandi skjøl

- Námsætlan – kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9
- Støðisnámsætlan
- Leistur – eftirmeting og afturboðan

# Innihaldsyvirlit

1. Skipan av undirvísing .......... 3
2. Kjarnaøki .......... 3
 2.1. Kvæðamentan .......... 4
 2.2. Kvøðing .......... 4
 2.3. Føroyskur dansur .......... 4
3. Førleikar .......... 5
 3.1. Faklig førleikamál – 3. floksstig .......... 5
 3.2. Faklig førleikamál – 6. floksstig .......... 7
 3.3. Faklig førleikamál – 9. floksstig .......... 9
4. Eftirmeting og afturboðan .......... 12

# 1. Skipan av undirvísing

Kravda undirvísingarevnið í kvæðamentan, kvøðing og føroyskum dansi er ikki beinleiðis tongt at ávísari lærugrein, men kann tó lættliga samantvinnast við undirvísing í fleiri lærugreinum. Kvæðamentan hóskar væl til undirvísing í føroyskum, donskum, heimstaðarlæru, søgu og samtíð og samfelagsfrøði. Kvøðing hóskar væl í føroyskum og sangi og tónleiki. Føroyski dansurin hóskar væl í føroyskum og ítrótti. Mælt verður eisini til at seta felagstíð av í skúlanum til at dansa saman.

Flokslærarin hevur ábyrgdina av at skipa fyri, at undirvíst verður í kvæðamentan, kvøðing og føroyskum dansi. Hetta verður gjørt í samráð við toymið kring flokkin. Er lærari í toyminum, ið hevur serligan áhuga fyri føroyskum dansi, kann flokslærarin sameina seg við hann/hana. Undirvísingarevnið hevur serliga nógv í felag við lærugreinina føroyskt, og tí er eisini skilagott at skipa undirvísingina í samráð við læraran í føroyskum. Skilagott er eisini, at skúlin hevur eitt ella fleiri akkersfólk, ið skipa fyri kvøðingini í øllum skúlanum og t.d. fara runt í allar flokkar at leggja lag á.

Vanligast er, at skúlarnir seta tíð av í dansitíðini, tað er millum jóla og føstu, til kvæðamentan, kvøðing og føroyskan dans. Til ber eisini at seta tíð av alt árið til evnið. Eitt nú eru skúlar, sum fara upp á gólv eina ferð um vikuna alt skúlaárið, tó ikki í føstu. Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur er eisini væl egnað evni til evnisviku ella evnisdagar. Fleiri skúlar bera so í bandi, at flokkarnir hvør sær læra seg kvæði, dans og kvæðamentan, og so dansar allur skúlin saman einaferð um vikuna. At enda er so ein stórur dansidagur, ofta í sambandi við føstulávintshald.

Viðmælt verður, at skúlarnir velja eitt kvæði hvørt árið, sum allir flokkar í skúlanum læra seg, ella at eitt kvæði verður valt til hvørja deild í skúlanum. Velur mann eitt kvæði til hvørja deild, fáa næmingarnir høvi at venda aftur til kvæðið, næstu ferð tað er á skrá (t.e. tá ein yngri flokkur lærir tað), og harvið læra tað betur. Skilagott er eisini at hava eitt kvæði/rímu, sum allir næmingarnir í skúlanum duga, og sum verður kvøðið á hvørjum ári. Hetta kann t.d. vera Sankta Simeon ella eitt kvæði úr nærumhvørvinum, so sum Seyðamaðurin á Sondum í Vágum.

# 2. Kjarnaøki

*Kravda undirvísingarevnið kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur trý kjarnaøki. Økini umskarast og virka fyri ein stóran part saman í undirvísingini.*

- *Kvæðamentan*
- *Kvøðing*
- *Føroyskur dansur*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Týdningarmikið er, at hesi trý kjarnaøkini verða flættað saman, soleiðis at næmingarnir fáa eina heildaruppliving, sum gevur teimum kunnleika um evnið.

## 2.1. Kvæðamentan

*Kjarnaøkið kvæðamentan fevnir um kvæði, vísur, tættir rímur og sangir, sum verða borin fram við kvæða- og vísuløgum, og sum dansað verður afturvið. Næmingarnir fáa innlit í mentan og siðvenjur kring kvæðini og í kvæðini sum munnbornar frásagnir. Komið verður inn á stíleyðkenni við kvæðunum, og arbeitt verður eisini við uttanatlæru og kvøðing sum framsagnarhátti.*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Næmingarnir læra um siðvenjurnar, sum eru kring føroyska dansin, kvæðasøgu, kvæði sum skaldskap og týdningin, sum kvæðini hava havt fyri føroyingar og føroyska málið.

## 2.2. Kvøðing

*Kjarnaøkið kvøðing leggur dent á kvæða- og vísuløgini, sum eru karmar um kvøðingina. Dentur verður lagdur á variatiónir og á leiklut skiparans at stýra kvøðingini, sum saman við dansilagnum skapar huglagið og frásøgnina í framførsluni. Komið verður eisini inn á munin millum framførslu av kvæðum í dansi og aðra tónlistarliga framførslu av kvæðum.*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Næmingarnir læra løgini, og hvussu kvæðini verða framborin við at kvøða, heldur enn at syngja. Tey læra eisini at skipa, og hvønn týdning skiparin hevur fyri dansin. Skiparin stýrir ferðini, huglagnum og tónaleguni, sum ger, at fólk fáa verið við. Harumframt læra næmingarnir at fáa kvæði undir fót, t.e. at fáa tekst, lag og rytmu at spæla saman.

Næmingarnir fáa eisini innlit í, hvussu kvæðini vórðu brúkt fyrr og nú, bæði í kvæðahøpi og tónlistarligum høpi.

## 2.3. Føroyskur dansur

*Kjarnaøkið føroyskur dansur fevnir bæði um siðbundna dansiringin og um ymisk dansispøl. Dentur verður lagdur á dansistev, dansilag og á serliga leiklutin hjá skiparanum í dansinum. Eisini verður komið inn á mentan og siðvenjur kring føroyskan dans og á føroyska dansin sum týðandi tátt í felagsskapi og í frásøgn.*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Næmingarnir læra at dansa føroyskan dans við teimum meginreglum, sum eru í dansi, t.d. handatak, stev, at geva skiparanum rúm og at tillaga seg dansilagnum í ringinum.

# 3. Førleikar

## 3.1. Faklig førleikamál – 3. floksstig

Fakligu førleikamálini á 3. floksstigi eru leiðbeinandi og orðað sum væntanir fyri fakligu úrtøkuna, sum stinnastu næmingarnir hava ognað eftir 3. floksstig. Eins og kjarnaøkini umskarast ymsu fakligu førleikamálini, og í flestu førum verður arbeitt við fleiri førleikamálum samstundis.

- *nakrar snildir til uttanatlæru*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Tað kann vera at kvøða saman í flokkinum, lurta eftir kvæðum, tekna øríndini sum teknirøð, lesa uppá, hoyra hvønn annan, og so kann lærarin eisini skipa fyri spølum fyri at hjálpa næmingunum á leið.

- *nakrar sangtekstir/rímur og løgini, t.e. at kvøða við í dansi, og at greiða frá søgunum í tekstunum*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Dømi um sangtekstir/rímur:

- Burtur á heiði
- Veturin kom
- Nú liggur ein kavafonn
- Lítli Snar
- Kongaríkið í Babylon
- Eg kendi mær ein ríkmann
- Bjerget ligger langt ud i skoven
- Mús upp á korn (Rottujól)
- Sankta Simeon
- Kall og Svein ungi
- Øskudólgur og Sópingarkona

Gott er at greiða næmingunum frá innihaldinum í tekstunum, áðrenn farið verður undir at læra seg uttanat.

- *trý ella fleiri kvæði/brot úr kvæðum (50-100 øríndi til samans) og løgini, t.e. at kvøða við í dansi, og at greiða frá søgunum í kvæðunum*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Skotið verður upp, at næmingarnir læra eitt kvæði ella brot (umleið tjúgu øríndi ella fleiri) úr einum kvæði í hvørjum skúlaári. Hóskandi kvæði í grunddeild eru t.d.:

- Ólavur Riddararós
- Sigmundskvæði yngra
- Nykursvísa
- Risin og Kellingin

Næmingarnir skulu eisini læra, hvat kvæðini snúgva seg um, og um søgurnar aftan fyri tey.

- *at skyna á siðvenjum og mentan kring kvæði og føroyskan dans, bæði fyrr og í dag*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Undir hesum verður greitt frá siðvenjum kring kvæðini, t.d. verður greitt frá skaldskapi á mannamunni, kvøldunum í roykstovuni, brúðardansi og ólavsøkudansi. Harumframt eigur at vera greitt frá dansinum í dansifeløgum. Er dansifelag nærindis, er skilagott at vitja dansifelagið ella biðja limir í dansifelagnum vitja skúlan. At fara upp á gólv saman við dansifelagnum er við til at varðveita staðbundna dansilagið.

- *at taka lut í føroyskum dansi, t.e. at duga stev, takt, handatak, grundleggjandi dansilag og dansisiðir, t.e. at lata skiparan byrja ørindini, at kvøða við og/ella lurta*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Stev: tvey til vinstru og eitt til høgru.

Takt: dansifólkini skulu fylgja taktini hjá skiparanum og ansa eftir ikki at títta ella sakta dansin.

Handatak: at halda í hondina hvør á øðrum. Høgra hond omaná og vinstra hond undir.

Grundleggjandi dansilag: at liva við í kroppinum, ikki lata armarnar hanga deyðar niður við síðuni, at hyggja upp á onnur í dansinum, at boyggja knøðini.

Dansisiðir: at lata skiparan einsamallan byrja hvørt ørindi. Skiparin má í minsta lagi sleppa at kvøða tey fyrstu trý orðini í hvørjum ørindi einsamallur. Næmingarnir skulu læra, at í føroyskum dansi kvøður man við ella lurtar ella bæði. Ikki er loyvt at tosa saman í ringinum ella at roksa á annan hátt.

- *at fáa samband við hini í ringinum, t.d. við andlitsbráum og eygnasambandi*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Fyri at uppliva dansiringin sum ein felagsskap er umráðandi at hava samband við hini í ringinum. Tí kann lærarin eggja næmingunum til at hyggja inn í eyguni á hvørjum øðrum og heilsa upp á hvønn annan. Eitt nú kann lærarin biðja næmingarnar heilsa upp á fimm aðrar næmingar, áðrenn trý ørindi eru kvøðin.

- *eitt ella fleiri dansispøl*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Dømi um dansispøl:

- Kráka situr á steini
- Seman man nemar
- Ríða ediling
- Slippidansur
- Dansa innaní

- *at skyna á muninum á at kvøða og at syngja*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Tá vit kvøða, fáa vit kraft á røddina og leggja trýst á taktina.

# 3.2. Faklig førleikamál – 6. floksstig

Fakligu førleikamálini á 6. floksstigi eru leiðbeinandi og orðað sum væntanir fyri fakligu úrtøkuna, sum stinnastu næmingarnir hava ognað eftir 6. floksstig. Eins og kjarnaøkini umskarast ymsu fakligu førleikamálini, og í flestu førum verður arbeitt við fleiri førleikamálum samstundis.

- *nakrar snildir til uttanatlæru*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Tað kann vera at kvøða saman í flokkinum, lurta eftir kvæðum, skriva ørindi niður, t.d. sum fagurskrift ella sum fyrisøgn, lesa uppá, hoyra hvønn annan, og so kann lærarin eisini skipa fyri spølum fyri at hjálpa næmingunum á leið.

- *nakrar sangtekstir/rímur og løgini, t.e. at kvøða við í dansi, og at greiða frá søgunum í tekstunum*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Dømi um sangtekstir/rímur aftur at teimum, sum vórðu nevnd í grunddeild, eru:

- Í Gøtu ein dag
- Føroyingar, sum her nú koma saman
- Fótbóltstáttur
- Per fór til Havnar
- Gubbi og eg

- *seks ella fleiri kvæði/brot úr kvæðum (75-150 ørindi til samans) og løgini, t.e. at kvøða við í dansi, og at greiða frá søgunum í kvæðunum*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Skotið verður upp, at næmingarnir læra eitt kvæði ella brot (umleið tjúgu ørindi ella fleiri) úr einum kvæði í hvørjum skúlaári. Hóskandi kvæði í miðdeild eru t.d.:

- Leivur Øssursson
- Brestiskvæði
- Flóvin Bænadiktsson
- Guðbrandskvæði
- Hørpuríma

Næmingarnir skulu eisini læra, hvat kvæðini snúgva seg um, og um søgurnar aftan fyri tey. Er yrkjarin kendur, kann man greiða næmingunum frá yrkjaranum.

- *at skyna á muninum á eldru munnbornu kvæðunum og nýggjaru kvæðunum*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

T.e. at greiða frá, at eldru kvæðini eru skaldskapur á mannamunni, meðan vit viðvíkjandi yngru kvæðunum kenna yrkjaran.

- *at skyna á muninum á kvæðum og táttum*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Tað, sum eyðkennir ein tátt, er, at hann er yrktur um viðurskifti, sum fara fram í somu tíð, sum hann verður yrktur. Ein táttur viðger evni á skemtiligan hátt og ger gjøldur við ávísum persóni/um ella støðum.

- *at greiða frá siðvenjum og mentan kring kvæði og føroyskan dans, bæði fyrr og í dag*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Í miðdeild skulu næmingarnir duga at greiða frá siðvenjum kring kvæðini, sum tey lærdu at skyna á í grunddeild. Harumframt eiga næmingarnir at vita, at dansitíðin er frá jólum til føstulávint, og at vanliga verður ikki dansað í føstu, t.e. millum føstulávint og páskir. Er dansifelag nærindis, verður viðmælt at vitja dansifelagið heldur enn at bjóða teimum inn í skúlan. So ber eisini til at vísa næmingum dansistovuna og á virksemi í dansifelagnum, t.d. gjøgnum prýði á veggunum.

At fara upp á gólv saman við dansifelagnum er við til at varðveita staðbundna dansilagið. Eisini kunnu limir í dansifelagnum greiða frá staðbundna dansilagnum.

- *at skyna á leiklutinum hjá skiparanum í dansi*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Skiparin er tann, ið fortelur søguna. Hann/hon eigur tey fyrstu trý ella fýra orðini í hvørjum ørindi, og tað er hann/hon, ið ásetir tónalag, ferð og dansilag.

- *at taka lut í føroyskum dansi við dansilagi, at bróta ringin í dansi og at kvøða við í góðari tónalegu og fáa kraft á røddina*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Gott dansilag er at hava kroppin við, tá ið dansað verður. At bróta ringin merkir, at ringurin ikki bara er rundur, men buktar seg. Hetta ger, at dansifólkini koma nærri hvørjum øðrum og fáa betri samband við hvønn annan. Góð tónalega er at kvøða soleiðis, at flest øll kunnu kvøða við.

- *at fáa samband við hini í ringinum, t.d. við andlitsbráum og eygnasambandi*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Fyri at uppliva dansiringin sum ein felagsskap er umráðandi at hava samband við hini í ringinum. Tí kann lærarin eggja næmingunum til at hyggja inn í eyguni á hvørjum øðrum og heilsa upp á hvønn annan. Eitt nú kann lærarin biðja næmingarnar heilsa upp á fimm aðrar næmingar, áðrenn trý ørindi eru kvøðin.

- *at skipa í dansi*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Miðað verður eftir, at allir næmingar royna at skipa í dansi, antin sum einstaklingar ella í bólki.

- *tvey ella fleiri dansispøl*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Dømi um dansispøl aftur at teimum, sum vóru nevnd í grunddeild, eru:

- Bandadansur
- Sandoyardansur
- Gamla keta

- *at skyna á muninum á kvøðing og aðrari tónlistarligari framførslu av kvæðum*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Í dag eru fleiri, sum brúka kvæðaløgini til kórsang og tónleik. Gott er at tosa við næmingarnar um hetta og seta orð á týðiliga munin millum kvøðing og aðra framførslu av kvæðum.

# 3.3. Faklig førleikamál – 9. floksstig

Fakligu førleikamálini á 9. floksstigi eru leiðbeinandi og orðað sum væntanir fyri fakligu úrtøkuna, sum stinnastu næmingarnir hava ognað eftir 9. floksstig. Eins og kjarnaøkini umskarast ymsu fakligu førleikamálini, og í flestu førum verður arbeitt við fleiri førleikamálum samstundis.

- *nakrar snildir til uttanatlæru*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Næmingarnir kunnu t.d. hava spurnarkappingar, gera leik, skriva orðabók, skriva rennifyrisøgn og kappast um, hvør fyrst verður liðug/-ur at læra ásetta ørindatalið.

- *nakrar sangtekstir/rímur og løgini, t.e. at kvøða við í dansi, og at greiða frá søgunum í tekstunum*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Dømi um sangtekstir/rímur aftur at teimum, sum vórðu nevnd í grund- og miðdeild, eru:

- Havnargentan kvøður
- Vatntátturin
- Vælkomnir føroyingar
- So vakrar moyggjar og knappar menn
- Áttamannafarið

- *átta ella fleiri kvæði/brot úr kvæðum og eina ella fleiri norðurlendska/r vísur/brot úr norðurlendskum vísum (100-200 ørindi til samans) og løgini, t.e. at kvøða við í dansi, og at greiða frá søgunum í kvæðunum og vísunum*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Skotið verður upp, at næmingarnir læra eitt kvæði ella brot (umleið tjúgu ørindi ella fleiri) úr einum kvæði í hvørjum skúlaári. Hóskandi kvæði í hádeild eru t.d.:

- Veðratáttur
- Jákupsa skegg
- Ormurin Langi
- Harra Pætur og Elinborg
- Kópakvæði
- Seyðamaðurin á Sondum
- Sinklars vísa
- Stolt Signhild

- Mallebro
- Nordan for Trondhjem
- Grindavísan
- Jákup á Møn

Næmingarnir skulu eisini læra, hvat kvæðini snúgva seg um, og um søgurnar aftan fyri tey. Er yrkjarin kendur, kann man greiða næmingunum frá yrkjaranum.

- *at greina kvæði og vísa á stíleyðkenni, so sum ørindislag, rím, endurtøkur, ferðaørindi, niðurlag og kvæðamál*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Ørindislag: hvussu nógvar reglur eru í ørindinum

Rím: endarím, t.d. abcb ella abab, og stavrím.

Endurtøkur: ørindi, sum líkjast nógv, og siga í veruleikanum tað sama.

Ferðaørindi: ørindi ella røð av ørindum, sum eisini koma fyri í øðrum kvæðum, t.d.:

> Gingu teir til strandar oman,
> ríkir menn og reystir.
> Lunnar brustu og jørðin skalv,
> teir drógu knørr úr neysti.

Niðurlag: episkt ella lyriskt niðurlag. Episkt niðurlag vísir til kvæðatekstin. Dømi er niðurlagið til Sjúrðarkvæðini:

> Grani bar gulli av heiði,
> brá hann sínum brandi av vreiði.
> Sjúrður vá á orminum.
> Grani bar gulli av heiði.

Lyriskt niðurlag hongur ikki saman við kvæðatekstinum. Dømi er niðurlagið til Sigmundskvæði yngra:

> Noregs menn, dansið væl í stillum,
> stillið tykkum allar,
> riddarar, Noregs menn,
> dansið væl í stillum.

Niðurlagið verður antin kvøðið eftir hvørt ørindi, ella er tað innflættað og verður kvøðið millum ørindisreglurnar.

Kvæðamál: kvæðamál er t.d. heiti og kenningar. Heiti er, tá kvæði brúkar annað orð í staðin fyri orð úr dagligari talu. T.d. *gangari* í staðin fyri hestur. Kenning er tá eitt orð verður lýst við øðrum orði, sum vísir til eginleikar hjá luti/persóni. T.d. svørð = *eggjateinur*. Egg er kvassur kantur, teinur er langur pinnur. Eggjateinur er tískil ein langur pinnur við hvøssum kantum, also eitt svørð.

- *at greiða frá kvæðasøgu og kvæðabólkum*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Kvæðasøga: hvar og hvussu kvæðini hava livað gjøgnum tíðina.

Kvæðabólkar:

- Halgikvæði eru kvæði við kristnum innihaldi. Dømi er Torkilsdøtur.
- Kappakvæði, har kappar og bardagið er innihaldið. Ofta eru risar við í søguni. Dømi eru Sjúrðarkvæðini.
- Riddarakvæði, har persónarnir eru úr tí fína selskapinum, kongar og drotningar og riddarar. Dømi er Flóvin Bænadiktsson.
- Skemtikvæði eru kvæði við skemtiligum innihaldi. Dømi er Øskudólgur og Sópingarkona.
- Náttúrukvæði eru kvæði um álvar og aðrar yvirnatúrligar verur, sum fólk trúðu uppá. Dømi er Nykursvísa.
- Sannsøgulig kvæði eru yrkt um veruligar hendingar, sum eru farnar fram júst tá. Dømi er Frúgvin Margreta.

- *at greiða frá týdninginum, sum kvæðini hava havt fyri føroyska mentan og føroyskt mál*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Viðvíkjandi føroyskari mentan snýr tað seg um at geiða frá tí týdningi, sum kvæðini hava havt fyri lívið hjá føroyingum. Hvussu føroyingar hava brúkt kvæði til at stytta sær stundir í arbeiði, hvussu tey hava brúkt kvæðini til undirhald, og hvussu tey hava brúkt kvæðini til at geva høgtíðsdøgum ein serligan dám.

Føroyska skriftmálið kom ikki fyrr enn í seinnu hálvu av 19. øld. Skaldskapur av mannamunni og kanska serliga kvøðingin eru óivað størsta atvoldin til, at føroyska málið hevur yvirlivað í so nógvar øldir uttan skriftmál.

- *at greiða frá leiklutinum hjá skiparanum í dansi*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Í hádeild skulu næmingarnir duga at greiða frá tí, sum tey lærdu um skiparans leiklut í miðdeild.

- *at laga seg eftir tí dansilagi, sum er í dansinum og at fáa kvæði undir fót*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Dansilag er at hava rytmuna í kroppinum. Ein máti at læra seg livandi dansilag er at dansa, meðan man stendur í stað. At fáa kvæði undir fót er at fáa tekstin, tónarnar og dansilagi at spæla saman.

- *at fáa samband við hini í ringinum, t.d. við andlitsbráum og eygnasambandi*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Fyri at uppliva dansiringin sum ein felagsskap er umráðandi at hava samband við hini í ringinum. Tí kann lærarin eggja næmingunum til at hyggja inn í eyguni á hvørjum øðrum og heilsa upp á hvønn annan. Eitt nú kann lærarin biðja næmingarnar heilsa upp á fimm aðrar næmingar, áðrenn trý ørindi eru kvøðin.

- *trý ella fleiri dansispøl*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Tað ber væl til brúka dansispølini, ið vóru nevnd í grund- og miðdeild í hádeild, men tað eru eisini meira ókend dansispøl, sum man kann tríva í, so sum:

- Spenna upp á spora
- Reisa hjørt
- Krumsakka

- *at greiða frá muninum á kvøðing og aðrari tónlistarligari framførslu av kvæðum*

*Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur 1-9*

Í hádeild skulu næmingarnir duga at greiða frá tí, sum tey lærdu í miðdeild um kvæðaløg í øðrum samanhangi enn føroyskum dansi.

# 4. Eftirmeting og afturboðan

*Aðalmálið við allari undirvísing í øllum skúlaverkinum er, at allir næmingar áhaldandi læra og mennast, og tí eru reglulig eftirmeting og afturboðan um úrtøku og menning næminganna sameindur partur av allari undirvísing í øllum lærugreinum og á øllum stigum í skúlaverkinum.*

*Støðisnámsætlan*

Næmingarnir skulu javnan fáa afturboðan og leiðbeining í sínum arbeiði. Hetta kann eitt nú gerast við javnan at vísa á førleikamálini og at vísa á hóskandi hjálparmiðlar og arbeiðshættir, sum næmingarnir kunnu fáa gagn av. Afturboðanin kann vera munnlig ella skrivlig. Víst verður til leiðbeinandi skjalið ”Leistur – eftirmeting og afturboðan”, sum lærarar kunnu styðja seg til.

Umráðandi er, at lærarin leggur undirvísingina soleiðis til rættis, at næmingarnir fáa bestu fortreytir at læra. Tískil eiga undirvísingargongdir altíð at eftirmetast við tí fyri eyga at betra um undirvísingina.